TILTØK

FØÐINGAR

17. des. fingu Mette Klarlund og Sjúrður Fróði Olsen, Hellerup, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3150 gr.

21. des. fingu Mirjam og Jógvan Heinesen, Viðareiði, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4400 gr.

28. des. fingu Rúna Clementsen, Skopun og Jaspur Jakobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3900 gr.

28. des. fingu Amanda Joensen og Magni Andreasen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4450 gr.

28. des. fingu Angilie Johannesen og Jan B. Olsen, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3450 gr.

28. des. fingu Maria Hammer Olsen og Andrias Mikkelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4400 gr.

30. des. fingu Eydna Weihe og Fríðmund Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 59 cm. langur og vigaði 4330 gr.

30. des. fingu Linda og Jimmy Jensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

30. des. fingu Mathilda og Pól Johannessen, Hvannasund, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4050 gr.

31. des. fingu Annika og Adrian Dalsá, Saltangará, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3450 gr.

1. januar fingu Jensa Heinesen og Jógvan Berthelsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3300 gr.

29. nov. fingu Erla W. og Theodor Erling Johannesen, Keypmannahavn, hesa fittu dóttrina. Hon eitur Sunnvá og var 50 cm. long og vigaði 3580 gr.

ANDLÁT

28. desember
Joen Pauli Durhuus, vanliga nevndur Palli í Garðastovu, Vestmanna, 73 ár.

29. desember
Alberta Hansen, Klaksvík, ættað av Norðoyri, 64 ár.

30. desember
Heðin Vardum, Tórshavn, 64 ár.
Dánjal Jensen, Strendur, vanliga nevndur Dánjal á Dul, 86 ár.

31. desember
Egon Thomsen, Froðba, 54 ár.

02. januar
Richard Poulsen, Innan Glyvur, 76 ár.
Dánjal Johannus Petersen, Porkeri, 31 ár.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 5. jan.: Hálvdan Simonsen, tlf. 441490
Sunnudagin 6. jan.: Sverri Lamhauge, tlf. 448016

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Gudstænastur Trettanda
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein, talvan gongur fyri Ytrimissiónina
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Argir: kl. 11 altarg., Heri Joensen
Hestur: kl. 20 altarg., Heri Joensen
Kaldbak: kl. 12, Bjarni Bæk
Tjørnuvík: kl. 12, Marjun Bæk
Sandavágur: kl. 12, Inga P. Dam
Bøur: kl. 12.
Sørvágur: kl. 17, David Johannesen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Vága prestagjaldi fyri Heidningamissiónina
Norðskála: kl. 11.40, skriftamál, kl. 12, messa
Eiði: kl. 19, messa. Emil Olsen. (Jóla- og nýggjárshald í missiónshúsinum Karmel aftaná við Jógvan Fríðrikssyni, presti. Jónhilda og Gulak syngja.
Norðskála: kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson
Gøta: Fríðrikskirkjan, kl. 11, gamla kirkjan kl. 18. Martin R. Jacobsen. Talvan gongur fyri heidningamissiónina
Hattarvík: kl. 12.
Kirkja: kl. 17. Elsa Funding
Elduvík: kl. 12 altarg.,
Funningsfjørður: kl. 16, altarg., Uni Næs. Talvan gongur í Fuglafjarðar prestagjaldi fyri kristniboðan kirkjunnar.
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalíð
Fámjin: kl. 12, altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Bíbliufelagið
Porkeri: kl. 12. Marianne Telling

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17 Møti. Øll eru vælkomin.

Kirkju og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Hera Tróndheim.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 14 í KFUK: Eldrasamkoman við Helenu og Hanusi Samuelsen. Evni: Trettandi.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn byrjar aftur eftir jólafrítíðina.

Katólska kirkjan
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 16 Veitsla fyri sunnudagsskúlabørnum. Sunnudagsskúlin kl. 12 og fundurin kl. 18 eru avlýstir.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18.00 Møti, har Heðin Lamhauge talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbrótting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Heimsbønarvikan byrjar við møti v/ Regin Olsen, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimsbønarløta.

Filadelfia
Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn, í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Simun Absalonsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli kl. 17 Møti.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti v/ Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Tlf. andaktin 424741.

Filadelfia, Sundalagið
Miðdepilin og Urtagarðurin halda frí til 16.01.02.

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Pola Jacobsen o.fl.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Húsakórið syngur, sangarar møta kl. 17. Innsavnan og drekka. Øll eru vælkomin.

Keldan, Skálfirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Eyðun Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj, Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Filadelfia, Gøtugjógv
Nýggjársveitslurnar verða leygardagin 5. jan. Fyri børnum kl. 15 og fyri vaksnum kl. 20.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Niels J. Nielsen, trúboðara. Innsavnan. Aftaná verður kaffi.

Siloa, Fuglafirði
Nýggjársveitslan verður í kvøld kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Leygardagin kl. 19 Jólafest fyri vaksin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, Lovsangs- og bønarmøti kl. 17.30, kl. 18 Møti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Bønarvikan byrjar sunnukvøldið kl. 18 við Albert og Monsu og heldur fram vikuna út hvørt kvøld við møti kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Innsavnan verður til húsið sunnukvøldið.

Café One Way, Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 19.00 verður nýggjárshugni í café'ini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Porkeri
Kvinnumøti verður mánadagin kl. 20.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Dagtilhaldið í Vági
byrjar aftur 10. jan. Øll eru vælkomin. Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Reyða Kross Føroya,
Bryggjubakki 10,
100 Tórshavn
tlf. 311391/261516.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Hósdagin 3. januar
kl. 10-17 Opið hús
Fríggjadagin 4. januar
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.Týskvøld: Er bara fundur ólika viku nr. Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Ein sáðmaður fór út at sáa sáð sítt.«
Lukas. 8,5

Guds orð er livandi og máttmikið og kann útinna undurverk. Tað kann vekja hin sovandi, ið svevur sín trygga syndasvøvn, til lívs. Tað kann boyggja hin stoltasta, so at hann fellur á knæ fyri Gudi. Tað kann fáa hin størsta spottara til at angra syndir sínar og biðja um náði og bjarging. Tað kann troysta hin mest vónleysa og ólukkuliga, so at hann aftur kann gerast glaður og troysta á Guds kærleika og náði. Tað kann reisa hin djúpast falna og gera hann til nýggja menniskju.

Vit kunnu vera samd um, at Guds orð er livandi og máttmikið og kann útinna undurverk. Og tó mega vit eisini viðganga, at tað mangan kann tykjast so deytt og máttleyst og at virka so lítið. Tað verður undirvíst í tí í skúlum okkara. Tað verður prædikað í kirkjum okkara. Vit eiga tað í heimum okkara. Vit hoyra tað í útvarpi og sjónvarpi. So at eingin kann við røttum siga, at Guds orð ikki verður ríkiliga sáað. Tað verður sáað til høgru og vinstru og allar staðir, eins og vit hoyra í tekstinum um sáðmannin.

Hvussu ber tað tá til, at Guds orð tykist mangan at bera so lítlan ávøkstur hjá okkum? Onkur vil kanska tveita ábyrgdina frá sær sjálvum og siga, at tað munnu vera prestarnir, sum hava sína stóru skuld í hesum. Høvdu teir bert prædikað við meira anda og kraft, vildi sæð øðrvísi út og orðið vildi borið ávøkstur. Tó, eisini áhoyrarin kann hava sína skuld. Og tað, sum Jesus í fyrsta lagi sigur um hetta, er: »Tit geva ikki tí orði, um tit hoyra, gætur, tí kemur djevulin og tekur tað frá tykkum«. Hetta er tað sáðið, sum fell fram við vegnum, ella á vegin.

Í øðrum lagi sigur Jesus: »Tit lýða ov leysliga á Guds orð – fara ov lætt um tað, sum tit hoyra. Tað kan nema við kenslurnar, meðan tað verður hoyrt, men skjótt følnar tað og verður av ongum«. Hetta er tað sáðið, sum fell á hellubotn. Í triðja lagi sigur Jesus: »Tit gera tykkum ónáðir og strið av mongum, sum køvir tað eina neyðuga, nevniliga at søkja Guds ríki fyrst o rættvísi hansara, tí at tá skal alt annað verða tykkum givið umframt«. Hetta er tað sáðið, sum fell millum tornir.

Men í fjórða lagi sigur Jesus: »Tit hava hoyrt orðið og tikið við tí. Tit koma til mín í gleði og sorg og lata orðið vera til styrki og leiðbeiningar í lívsins skiftandi lagi. Tit festa røtur og búnast í trúarlívinum«. Hetta er tað sáðið, sum fell í góða jørð. Her er talan um menniskju, sum taka alt av Guds hond og hvíla í náði hansara og kærleika. Í sær sjálvum eru tey ikki fullkomin heldur enn hini áðurnevndu, en tey hava fest røtur og kunnu tí av Guds náði bera frukt í tolni til Harrans æru og vera vitni um hann bæði í orði og verki.

So vilja vit tá ikki bert dvølja við alt tað, sum miseydnaðist og fór fyri skeyti, men eisini gleðast um tað, sum eydnaðist og bar ávøkstur. So er Guds orð, hóast tað kann síggja vónleyst út til tíðir, kortini livandi og máttmikið, sum skrivað stendur: »Himmal og jørð skulu ganga undir, men orð míni skulu als ikki forganga. Orð Harrans varir um allar ævir«.

Emil Olsen, prestur

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivtlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið,
Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10
tlf./fax 321520
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfrið Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail:
ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakóriið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

Føroyingafelagið í Svoríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang,
Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Kristnastova
Birmavej 36, København S,
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fællershuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyskt møti í Ålborg
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 5. februar kunnu hjúnini Marjun og Jákup Frants Larsen, Fuglafjørður halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 9. februar kl. 19.00 í bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja vera við til at hátíðarhalda dagin saman við teimum, verða biðin um at siga frá á tlf. 444102 í seinasta lagi leygardagin tann 19. januar.

BRÚDLEYP

Í kvøld 5. januar kl. 18.00 giftast í Kollafjarða kirkju Judith í Brekkunum, Hósvík og Gunnar Hansen, Kollafjørður.

Tann 2. februar giftast í Kelduni Arni Abrahamsen, Glyvrar og Annebeth Gaard Joensen, Skipanes. Vígslan er kl. 14.00 og kl. 20.00 eru øll vælkomin til ein kaffimunn í Bygdarhúsinum á Strondum. Tit, ið vilja gleðast við okkum henda dag, kunnu tekna tykkum á tlf. 441557 ella 449057 innan 20. januar.

PRÓGV

Barbara Jákupsdóttir, Tórshavn hevur lokið yrkisútbúgving sum hárfriðkanarkvinna. Lærumeistari var Peter Adamsen, Sorgenfri.

Lýsið við brúktum bilum
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialin